# PÁPAR OG FAMILJULÍV Í FØROYUM 2022



## *FRÁGREIÐING*

*KANNING AV GERANDISLÍVINUM, VIRÐUNUM OG FAMILJUVIÐURSKIFTUNUM HJÁ MONNUM Í FØROYUM (18-52 ÁR)*

**Firouz Gaini**
**© Fróðskaparsetur Føroya, 2023**
**© University of the Faroe Islands, 2023**

Myndlar: Elisabeth Thomsen
Kanning: Lóður Sp/f
Tilvísing:
Gaini, F. (2023). Pápar og familjulív í Føroyum 2022. Frágreiðing. Tórshavn: Fróðskaparsetur Føroya

# Um frágreiðingina

Hendan frágreiðingin er partur av granskingarverkætlanini *Faðirskapur í broyting? Kanning av gerandislívinum, familjuviðurskiftunum og maskulinitetinum hjá monnum – tvørtur um tvey ættarlið* (2019-2022), sum Søgu- og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya hevur staðið á odda fyri. Firouz Gaini, professari í antropologi, var verkætlanarleiðari. Frágreiðingini *Pápar og familjulív í Føroyum 2022* leggur fram úrslitini av landsumfatandi spurnakanning, sum varð gjørd í februar/mars 2022. Spurnakanningin, sum var gjørd í samstarvi við fyritøkuna Lóður, umboðar tann kvantitativa partin av granskingarverkætlanini. Talan er um fyrstu kanning av sínum slag í Føroyum.

Spurnakanningin hevði 650 luttakarar úr øllum landinum. Vit bjóðaðu 1.000 tilvildarliga útvaldum monnum í aldrinum 18-52 at luttaka. Menninir fingu skrivliga innbjóðing sendandi í postinum, har kunnað varð um hvussu teir kundu luttaka – at fara á alnetið at finna spurnablaðið hjá okkum. Talgilda spurnablaðið innihelt spurningar um nógv ymisk viðurskifti – heilsustøða, arbeiði, familjulív, gerandislív, javnstøða, barsilsfarloyvi, maskulinitetur, o.s.fr. Kanningin gav okkum sera rúgvusmikið tilfar, ið gevur okkum innlit í nógv áhugaverd viðurskifti í lívinum hjá føroyskum monnum í dag. Kanningin gevur eitt íkast til kjakið um føroyska pápan í 21. øld: hvussu lýsa menn í Føroyum tann 'føroyska pápan'? Hvørjar fyrimyndir hava teir, og hvussu sær gerandisdagurin hjá teimum út?

Granskingargrunnurin (Granskingarráðið), Betri Stuðul og Fróðskaparsetur Føroya stuðlaðu granskingarverkætlanini. Javnstøðunevndin gav eisini eitt fíggjarligt íkast til arbeiðið. Elisabeth Thomsen, masterlesandi á Fróðskaparsetrinum, hevur gjørt myndlarnar og talvurnar í frágreiðingini. Okkara vón er, at kanningin kann birta upp undir (granskingargrundað) kjak um foreldur, familjulív og javnstøðu í Føroyum. Saman við kvalitativa tilfarinum, sum vit hava savnað saman í sambandi við hesa verkætlanina, og sum verður viðgjørt í aðrari útgávu, so hava vit fingið eina vitan, ið ger, at vit betri kunnu skilja og viðgera støðuna hjá pápanum í føroyska nútíðarsamfelagnum.

Í kanningini verður landafrøðiliga eindin "í Havn" brúkt um tað sama sum "høvuðsstaðarøkið" og "tórshavnarøkið". Og "á bygd" verður brúkt um tað sama sum "uttan fyri tórshavnarøkið" og "uttan fyri høvuðsstaðarøkið". Í kanningini havi eg eisini valt at kalla allar myndlar og talvur fyri "talva".

# Pápar og familjulív í Føroyum 2022

Talva 1 vísir at 38% av monnunum í kanningini búgva í høvuðsstaðarøkinum, 9% búgva í Norðurstreymoy, meðan 24% búgva i Eysturoy. Og 10% av monnunum í kanningini búgva sunnanfjørðs.




Talva 2 vísir, at meira enn helvtin av monnunum búgva í egnum bústaði. Næstan ein triðingur av monnunum búgva hjá foreldrum ella familju. Einans 16% búgva til leigu, og tað sigur eitt sindur um føroyska bústaðarmarknaðin, ið hevur færri leigubústaðir enn tað, ið vit síggja í øðrum Norðanlondum.




Í talvu 3 síggja vit, hvussu menninir búgva í mun til tann aldursbólkin, teir hoyra til. Flestu menninir undir 30 ár búgva hjá foreldrum ella familju. Meira enn tveir triðingar av teimum gera tað. Og 17% av monnunum í aldursbólkinum 30-40 ár búgva eisini hjá foreldrum ella familju. Hetta eru lutfalsliga høg tøl samanborið við onnur Norðurlond. Næstan tveir triðingar (62%) av monnunum í aldursbólkinum 30-40 ár

hava egnan bústað. Hyggja vit at monnunum, ið eru eldri enn 40 ár, so búgva ikki færri enn 89% av teimum í egnum bústaði. Einans 3% av teimum yvir 40 ár búgva hjá foreldrum ella familju.




Í talvu 4 síggja vit, at tað er ein ávísur munur á bústaðarviðurskiftunum hjá monnum í Tórshavn og uttan fyri tórshavnarøkið. 25% av monnunum búgva til leigu í høvuðsstaðnum, meðan einans 11% búgva til leigu aðrastaðni í landinum. Tað eru eisini 8% fleiri, sum búgva í egnum bústaði uttan fyri høvuðsstaðin. Fjórði hvør maður í Havn býr hjá foreldrum ella familju.




Talva 5 fortelur okkum um familjustøðuna hjá monnunum, og har sæst at 29% eru stakir og 69% eru antin giftir ella í parlagi/samlivandi. Einans 2% av monnunum siga seg vera fráskildar ella sundurlisnar.




Talva 6 vísir, at 56% av monnunum undir 30 ár eru stakir, meðan ávikavist 23% og 9% av teimum í 30-árunum og teimum í 40-árunum (og upp til 52 ár) eru stakir. Hetta er ikki eitt óvæntað mynstur. 11% av teimum ungu monnunum eru giftir, meðan 70% av monnunum yvir 40 ár eru giftir (ella í skrásettum parlagi). 37% av monnunum í 30-árunum eru samlivandi uttan at vera giftir.




Talva 7 samanber menn, ið hava børn, við aðrar menn. Her sæst týðiliga, at tað at hava børn í stóran mun inniber at liva í hjúnalag. 60% av monnunum í kanningini, sum hava børn, eru giftir ella í skrásettum parlagi. Einans 6% av monnunum, sum hava børn, eru stakir. Hinvegin eru 63% av barnleysu monnunum stakir.




Talva 8 vísir, at av teimum 650 monnunum, sum luttóku í spurnakanningini, hava 60% børn. Og tað sigur seg sjálvt, at serliga eldru luttakararnir hava børn.




Talva 9 vísir at 82% av teimum undir 30 ár ikki hava børn, meðan einans 11% av monnunum yvir 40 ár eru barnleysir.



Talva 10 snýr seg um útbúgving. 8% av monnunum hava einans fólkaskúlaprógv, meðan 14% hava miðnámsskúlaprógv sum sína hægstu útbúgving. 16% av monnunum hava longri víðari/hægri útbúgving.




Talva 11 vísir at 8% av monnunum eldri enn 40 ár einans hava fólkaskúlaútbúgving. Og 38% av monnunum í hesum aldursbólki hava eina miðallanga víðari útbúgving. 30% av monnunum undir 30 ár hava miðnámsskúla sum hægstu útbúgving.




Talva 12 vísir hvørja útbúgving menninir hava í mun til bústað. 21% av monnunum í Havn hava eina langa víðari/hægri útbúgving, meðan 35% hava eina miðallanga víðari

útbúgving. Tilsvarandi tølini fyri teir, sum búgva uttan fyri tórshavnarøkið, eru ávikavist 13% og 31%. Talvan vísir eisini at nógv fleiri menn uttan fyri tórshavnarøkið hava eina handverkaraútbúgving.




Talva 13 vísir árinntøkuna hjá húsarhaldinum hjá monnunum. 45% av monnunum hoyra til húsarhald við inntøku millum 400.000 kr og 800.000 kr. Og 20% av húsarhaldunum hava eina samlaða árinntøku niðan fyri 400.000 kr. 17% av monnunum eru partur av húsarhaldi, sum tjenar oman fyri eina millión kr um árið.




Talva 14 vísir árligu inntøkuna hjá húsarhaldinum býtt eftir aldri. Tað er ikki heilt óvæntað, at yngru menninir hava lægri húsarhalds-inntøku í miðal enn menn yvir 40

ár. 13% av teimum undir 30 ár hoyra til húsarhald við ársinntøku niðan fyri 250.000 kr. Men ongin úr bólkinum av monnum yvir 40 ár hoyrir til húsarhald við so lágari ársinntøku. Tá tað kemur til húsarhald, ið tjena meira enn eina millión kr um árið, so er tað tó menninir í 30-árunum, sum umboða tann minsta bólkin. Einans 10% av hesum monnum hoyra til húsarhald við inntøku oman fyri eina millión kr. Helvtin av monnunum undir 30 ár hoyra til húsarhald, sum hava ársinntøku niðan fyri 600.000 kr.




Talva 15 gevur eina mynd av virðunum (konservativ ella liberal) hjá monnunum. Hvar siga menninir seg hoyra heima? Fimti hvør maður sigur seg hvørki vera konservativan ella liberalan. Næstan eins nógvir menn – 18% – svaraðu "veit ikki". Og 8% av monnunum siga seg vera sera konservativar, meðan 20% siga seg vera sera liberalar.









Talva 16 vísir tað sama sum talva 15, men við færri kategorium. 38% av monnunum eru liberalir og 22% eru konservativir.

Talva 17A hyggur at sama spurningi, men við útgangsstøði í aldursbólkum. Serliga ungu menninir eru í iva og svara “veit ikki”. 23% av monnunum undir 30 ár siga seg

vera konservativar ella sera konservativar. Hinvegin siga 37% av monnunum í hesum aldursbólkinum seg vera liberalar ella sera liberalar.






Talva 17B lýsir munin á monnum í Havn og á bygd viðvíkjandi spurninginum um konservativ/liberal virði. Í høvuðsstaðnum siga 59% av monnunum seg vera liberalar ella sera liberalar, meðan 15% siga seg vera konservativar ella sera konservativar. Uttan fyri høvuðsstaðin siga hinvegin 35% av monnunum seg vera liberalar ella sera liberalar, meðan 26% siga seg vera konservativar ella sera konservativar. Ávikavist 20% og 27% siga seg hvørki vera konservativar ella liberalar í Havn og á bygd.




Talva 18 lýsir arbeiðsstøðuna hjá monnunum. Teir flestu menninir – 75% - eru í arbeiði, 10% er undir útbúgving og 6% eru í læru. Haraftrat eru 10% sjálvstøðugir vinnurekandi.






Í talvu 19 síggja vit, at 23% av monnunum undir 30 ár eru lesandi. Meira enn helvtin – 57% - av monnunum í hesum aldursbólki eru í arbeiði. Og meira enn 80% av monnunum, sum eru 30 ár ella eldri, eru í arbeiði.




Talva 20 gevur upplýsingar um arbeiðsstøðuna hjá makanum hjá monnunum í kanningini. Og her síggja vit, at 71% av makunum eru í arbeiði. 3% av makunum eru arbeiðsleysir ella heimagangandi, meðan 7% eru í barnsburðarfarloyvi.

Talva 21 vísir at allarflestu menninir – 88% - arbeiða meira enn 36 tímar um vikuna. Einans 7% av monnunum siga seg vanliga arbeiða færri tímar um vikuna.




Talva 22 vísir tað sama sum talva 21, men við meira nágreiniligum upplýsingum um hvussu nógvar tímar um vikuna, menninir arbeiða. Meir enn helvtin av monnunum – 53% - arbeiðir 43 tímar ella meira um vikuna. Og einans 4% siga seg arbeiða minni enn 30 tímar um vikuna. 9% av monnunum arbeiða minni enn 37 tímar um vikuna.




Í talvu 23 síggja vit, at menn í øllum aldursbólkum arbeiða lutfalsliga nógv, men eisini at menn yvir 40 ár arbeiða mest. 91% av monnunum yvir 40 ár arbeiða vanliga 37 tímar ella meira um vikuna.




Talva 24 vísir hvussu nógv, makarnir hjá monnunum arbeiða. Fimti hvør maki arbeiðir minni enn 30 tímar um vikuna. 52% av makunum arbeiða vanliga í minsta lagi 37 tímar um vikuna.




Talva 25 vísir at makarnir hjá monnum, sum eru yngri enn 30 ár, arbeiða fleiri tímar um vikuna enn makarnir hjá monnum, sum eru 30 ár ella eldri. 73% av makunum hjá ungu monnunum arbeiða vanliga 37 tímar ella meira um vikuna.




Talva 26 vísir hvussu nógvir menn, ið hava búð uttanlands vegna útbúgvingarørindi. 24% av monnunum undir 30 ár hava búð uttanlands, meðan 49% av 30-40 ára gomlu monnunum hava roynt at búð uttanlands. Verður hugt at øllum monnunum í kanningini, so eru tað tilsamans 41%, sum hava búð uttanlands orsakað av útbúgvingarørindum. 19% av hesum 41% av monnum hava búð uttanlands fyri í minsta lagi 10 árum síðani. Eisini kann nevnast, at 52% av monnunum eldir enn 40 ár hava búð uttanlands orsakað av útbúgvingarørindum.




Talva 27 vísir tað sama sum talva 26, men býtt í øki. Meira enn helvtin – 54% – av monnunum í tórshavnarøkinum hava lisið uttanlands, meðan nógv færri – 34% – menn uttan fyri høvuðsstaðin hava lisið uttanlands. 29% av monnunum í

høvuðsstaðarøkinum hava búð uttanlands orsakað av útbúgvingarørindum fyri minni enn 10 árum síðani.




Í talvu 28 verður sami spurningur viðgjørdur, men sæð í mun til konservativu/liberalu virðini hjá monnunum. 70% av teimum monnum, sum siga seg hava konservativ virði, hava ikki búð uttanlands vegna útbúgving. Hjá monnum, sum siga seg hava liberal virði, er myndin ein onnur: 54% hava búð og lisið uttanlands.



Talva 29 lýsir heilsustøðuna hjá monnunum. Hóast heildamyndin ikki er vánalig, so síggja vit, at góð 10% av monnunum siga seg (meira enn annan hvønn dag) vera plágaðar av ymiskum trupulleikum – at stúra, vera nervøsur, kenna seg dapran í huga, o.a.




Í talvu 30 kemur fram, at yngstu menninir – undir 30 ár – eru í størri mun plágaðir av at kenna seg stúrnan ella nervøsan enn eldru menninir eru. 61% av teimum, sum eru 40 ár ella eldri hava ongantíð (seinastu 14 dagarnar) kent seg nervøsar ella stúrnar. Einans 43% av monnunum undir 30 ár siga tað sama.



Talva 31 hyggur at heilsustøðuni hjá monnum býtt í øki. Í høvuðsstaðnum og uttan fyri Havnina siga ávikavist 47% og 54% av monnum seg ongantíð (seinastu 14 dagarnar) hava kent seg nervøsar ella stúrnar.




Talva 32 hyggur at einum serligum trupulleika (ikki klára at steðga við at stúra ella at temja sína stúran) viðvíkjandi heilsuni hjá monnum býtt eftir aldri. Menn í aldrinum 18-29 ár hava størri avbjóðingar hesum viðvíkjandi enn eldru menninir. Meira enn ein triðingur av ungu monnunum – 35% – hava verið plágaðir av ikki at klára at steðga við at stúra seinastu 14 dagarnar. Einans ein av fimm monnum yvir 40 ár hevur havt sama trupulleika í sama tíðarskeiði.



Talva 33 hyggur at sama spurningi sum talva 32, men býtt í øki. Munurin er ikki stórur, hóast menn í Havn hava (í miðal) eitt sindur størri ampa av ikki at klára at steðga við at stúra. Ávikavist 69% og 75% av monnunum í Havn og á bygd siga seg ongantíð (seinastu 14 dagarnar) hava verið plágaðar av hesum.




Talva 34 lýsir støðuna hjá monnum í mun til trupulleikan av at "hava lítlan áhuga fyri ella gleði við at gera eitthvørt" býtt eftir aldri. Aftur her síggja vit, at yngstu menninir hava størri ampa av hesum enn menninir, sum eru 30 ár ella eldri. 12% av teimum undir 30 ár siga seg hava verið plágaðar av hesum trupulleikanum meira enn annan hvønn dag seinastu 14 dagarnar.



Talva 35 lýsir støðuna hjá monnum í mun til trupulleikan av at “hava lítlan áhuga fyri ella gleði við at gera eitthvørt” býtt í øki. Ávikavist 44% og 53% av monnunum í Havn og á bygd siga seg ongantíð (seinastu 14 dagarnar) hava verið plágaðar av hesum. 7% av monnunum í høvuðsstaðnum siga seg næstan hvønn dag vera plágaðar av hesum trupulleikanum.




Talva 36 lýsir støðuna hjá monnum í mun til trupulleikan av at “kenna seg dapran, vónleysan ella vera tungur í huga” býtt eftir aldri. Ávikavist 46% og 64% av monnunum undir 30 ár og monnunum yvir 40 ár siga seg ongantíð (seinastu 14 dagarnar) hava verið plágaðar av hesum. Fyri menn í aldursbólkinum 30-40 ár er tilsvarandi tal 53%.






Talva 37 lýsir støðuna hjá monnum í mun til trupulleikan av at "kenna seg dapran, vónleysan ella vera tungur í huga" býtt í øki. Ávikavist 46% og 60% av monnunum í Havn og á bygd siga seg ongantíð (seinastu 14 dagarnar) hava verið plágaðar av hesum. 13% av monnunum í høvuðsstaðnum siga seg meira enn helvtina av døgunum (seinastu 14 dagarnar) hava verið plágaðar av hesum trupulleikanum.




Talva 38 vísir at tveir av trimum monnum – 65% – siga seg hava góða ella stak góða heilsu. Ein lítil bólkur av monnum – 4% – siga seg hava vánaliga heilsu.




Talva 39 vísir at ungu menninir (undir 30 ár) í miðal hava eitt sindur vánaligari heilsu enn eldru menninir. Ávikavist 9% og 1% av monnunum undir 30 ár og monnunum yvir 40 ár siga seg hava vánaliga ella stak ringa heilsu. 69% av av monnum yvir 40 ár siga seg hava góða ella stak góða heilsu. Hjá monnum í 30-40 ára aldri enn tilsvarandi úrslit 63%.









Talva 40 vísir, hvørja áskoðan menninir hava um ymisk familjuviðurskifti. Hon vísir m.a. at 60% av monnunum eru samdir í, at pápar eiga at taka tað pápafarloyvið, sum teir hava rætt til. Og heili 88% av monnunum eru samdir í, at barnaansing er nakað, bæði foreldrini javnbjóðis hava ábyrgdina av. Einans annarhvør maður í kanningini – 52% – er samdur í, at pápar brúka nóg nógva tíð saman við børnum sínum. Nógvir eru hvørki samdir ella ósamdir í hesum, meðan 12% av monnunum eru ósamdir. 85% av monnunum eru samdir í, at pápar eiga at vera hjástaddir, tá barnið hjá teimum verður føtt. Einans 4% av monnunum eru beinleiðis ósamdir í hesum. 73% av monnunum í kanningini eru samdir í, at pápar kunnu taka sær av smábørnum á eins góðan hátt sum mammurnar. 14% av monnunum eru beinleiðis ósamdir í hesum.






Talva 41 vísir at fleiri menn í aldrinum 30-40 ár eru samdir í, at pápar eiga at taka tað farloyvi, teir hava rætt til, samanborið við yngru og eldru menninar í kanningini. 18% av monnum eldri enn 40 ár eru beinleiðis ósamdir í, at pápar eiga at gera hetta.




Talva 42 hyggur at sama spurningi, tó býtt í øki. Lítil munur er á monnum úr høvuðsstaðnum og av bygd viðvíkjandi áskoðan um pápafarloyvi. Millum menninar úr Tórshavn siga ávikavist 59% og 11% seg vera samdar og ósamdar í at pápar eiga at taka

alt tað pápafarloyvi, teir hava rætt til. Á bygd siga ávikavist 61% og 16% seg vera samdar og ósamdar í at pápar eiga at taka alt tað pápafarloyvi, teir hava rætt til.




Talva 43 vísir, at næstan allir menn, óansæð aldur, eru samdir í, at barnaansing er nakað, sum bæði foreldrini hava ábyrgdina av.




Talva 44, vísir at næstan allir menn, óansæð bústað, eru samdir í at barnaansing er nakað, sum bæði foreldrini hava ábyrgdina av. Einans ávikavist 4% og 3% av monnunum í Havn og á bygd eru beinleiðis ósamdir í hesum.




Talva 45 vísir at flestu menninir, óansæð virðir, eru samdir í at barnaansing er nakað, sum bæði foreldrini hava ábyrgdina av. Tó eru konservativu menninir minni samdir í hesum: ávikavist 79% og 9% av teimum konservativu eru samdir og ósamdir í hesum.




Talva 46 vísir, at 58% av monnunum í aldrinum 30-40 ár eru samdir í, at pápar sum heild brúka nógva tíð saman við børnum sínum. Fjórði hvør maður í hesum aldursbólkinum sigur seg hvørki vera samdan ella ósamdan í hesum. Millum menn í

aldurbólkinum 18-29 ár siga ávikavist 47% og 13% seg vera samdar og ósamdar í hesum. Millum menn yvir 40 ár siga ávikavist 52% og 12% seg vera samdar og ósamdar í hesum.




Talva 47 vísir, at lítil munur er á høvuðsstaðnum og restini av landinum viðvíkjandi spurninginum um tíðina, sum pápar brúka saman við børnum sínum.



Talva 48 vísir, at lítil munur er á konservativum og liberalum monnum viðvíkjandi spurninginum um tíðina, sum pápar brúka saman við børnum sínum. 52% av monnum, sum siga seg vera konservativar, eru samdir í at pápar brúka nógva tíð saman við børnum sínum. Millum menn, sum siga seg hava liberal virðir, siga ávikavist 47% og 14% seg vera samdar og ósamdar í at pápar brúka nógva tíð saman við børnum sínum.




Talva 49 vísir, at lítil munur er á ungum og eldri monnum viðvíkjandi spurninginum um pápar og barnaansing. 75% av 18-29 ára gomlu monnunum eru samdir í, at pápar kunnu taka sær av øllum tí, sum mammur taka sær av í mun til barnaansing. Millum menn eldri enn 40 ár siga ávikavist 70% og 14% seg vera samdar og ósamdar í hesum. Millum 30-40 ára gomlu menninar siga ávikavist 76% og 10% seg vera samdar og ósamdar í hesum.






Talva 51 viðgerð sama spurning í mun til konservativu/liberalu virðini hjá monnunum.




Talva 51 vísir, at ávikavist 83% og 56% av liberalu og konservativu monnunum eru samdir í at pápar kunnu taka sær av øllum tí, sum mammur vanliga taka sær av í mun til barnaansing. Næstan ein av trimum – 29% – monnum, sum siga seg hava konservativ virði, er beinleiðis ósamdur í hesum. 75% av monnum, sum siga seg vera "í miðjuni" (hvørki liberalar ella konservativar) eru samdir í at pápar kunnu taka sær av øllum tí, sum mammur vanliga taka sær av í mun til barnaansing.




Talva 52 vísir, at ein stórur meiriluti av øllum monnum, óansæð aldur, meinar, at pápar eiga at vera hjástaddir, tá barnið hjá teimum verður føtt.




Talva 53 vísir, at ein stórur meiriluti av øllum monnum, óansæð bústað (bý ella bygd), meina, at pápar eiga at vera hjástaddir, tá ið barnið hjá teimum verður føtt. Einans ávikavist 3% og 5% av monnum í Havn og á bygd eru beinleiðis ósamdir í hesum.

Talva 54 hyggur at sama spurningi, men í mun til konservativ/liberal virðir. Talvan avdúkar at sera lítil munur er á konservativum og liberalum monnum í hesum

spurninginum. Heili 85% eru samdir í at pápin eigur at vera hjástaddur, tá ið hansara barn verður føtt.




Talva 55 vísir áskoðanina hjá monnum í mun til spurningar um foreldraleiklut og barnauppaling. Annarhvør maður í kanningini sigur seg vera samdan í, at pápar eiga at fyrireika seg betur til at blíva pápar. 23% siga seg hvørki vera samdar ella ósamdar. At pápar læra børnini nakað annað enn tað, ið mammurnar læra tey, eru teir flestu menninir – 83% – samdir í. Einans 4% eru beinleiðis ósamdir í hesum. Spurdir um pápar eru líka dugnaligir at taka sær av børnum sum mammur eru, siga tveir triðingar av monnunum – 65% – seg vera samdar í hesum. Einans 10% eru beinleiðis ósamdir í hesum. 21% eru hvørki samdir ella ósamdir í hesum. Ein annar pástandur, sum menninir skulu taka støðu til, er hesin: "nógvar mammur ynskja ikki, at pápin ger ov nógv húsligt arbeiði". Men einans 9% av monnunum taka undir við hesum. Og ikki færri enn 61% eru beinleiðis ósamdir í hesum pástandinum. Uppaftur fleiri – 68% – menn eru ósamdir í pástandinum "nógvar mammur ynskja ikki, at pápin tekur sær av pinkubarninum..." Eisini her siga 9% av monnunum seg vera samdar í pástandinum.






Talva 56 vísir, at lítil munur er á yngri og eldri monnum, tá tað kemur til spurningin um, at pápar eiga at fyrireika seg betur til at blíva pápar. Millum menn, ið eru eldri enn 40 ár, siga ávikavist siga 53% og 12% seg vera samdar og ósamdar í, at pápar eiga at fyrireika seg betur til at blíva pápar. Millum menn, ið eru yngri enn 30 ár, siga ávikavist 50% og 11% seg vera samdar og ósamdar í hesum. Í øllum aldursbólkunum eru 20% ella fleiri, ið siga seg hvørki vera samdar ella ósamdar í, at pápar eiga at fyrireika seg betur til at blíva pápar.




Talva 57 vísir, at fleiri menn á bygd enn í Havn eru samdir í, at pápar eiga at fyrireika seg betur til at blíva pápar. Ávikavist 45% og 54% av monnum í høvuðsstaðnum og á bygd eru samdir í hesum. Og 13% av monnum úr høvuðsstaðnum eru beinleiðis ósamdir í, at pápar eiga at fyrireika seg betur til at blíva pápar.



Talva 58 spyr, um pápar læra børn síni nakað annað enn tað, ið mammurnar læra tey. 78% av 18-29 ára gomlu monnunum eru samdir ella púra samdir í hesum. Tá tað kemur til menn eldri enn 40 ár, so eru heili 88% samdir í hesum.




Talva 59 vísir, at 83% av øllum monnum, bæði á bygd og í Havn, eru samdir (ella púra samdir) í, at pápar læra børnini nakað annað enn tað, mammurnar læra tey.



Talva 60 vísir, at teir flestu menninir taka undir við, at pápar eru líka dugnaligir at taka sær av børnum, sum mammur eru. Einans ein av tíggju monnum er beinleiðis ósamdur í hesum.




Talva 61 vísir, at lítil munur er á monnum í Havn og á bygd tá hesin spurningurin verður umrøddur. Ávikavist 69% og 63% av monnum í Havn og á bygd taka undir við, at pápar eru líka dugnaligir at taka sær av børnum, sum mammur eru.



Í talvu 62 síggja vit, hvussu menninir hava svarað spurninginum: hvussu samdur ert tú í, at nógvar mammur ynskja ikki, at pápin ger ov nógv húsligt arbeiði. Ikki óvæntað, so er ein stórur meiriluti av monnunum ósamdur í pástandinum. Ávikavist 69% og 59% av monnum í aldurbólkunum undir 30 ár og yvir 40 ár eru ósamdir (ella púra ósamdir) í hesum. 14% av monnunum yvir 40 ár eru samdir (ella púra samdir) í pástandinum.




Talva 63 vísir at lítil munur er á monnum í Havn og á bygd viðvíkjandi spurninginum “hvussu samdur ert tú í, at nógvar mammur ynskja ikki, at pápin ger ov nógv húsligt arbeiði”. 67% av monnunum í Havn eru ósamdir (ella púra ósamdir), meðan 57% av monnunum á bygd eru ósamdir (ella púra ósamdir).






Talva 64A vísir úrslitið av svarum til spurningin: hvussu samdur ert tú í, at nógvar mammur ynskja ikki, at pápin tekur sær av pinkubarninum (skifta blæur, leggja at sova, o.l.). Nóg teir flestu menninir, serliga í bólkinum 30-40 ár, eru ósamdir (ella púra ósamdir) í pástandinum. Ávikavist 6% og 13% av monnunum í aldurbólkunum undir 30 ár og yvir 40 ár eru eru samdir (ella púra samdir) í pástandinum.






Talva 65 vísir, hvat ið menninir meina, at ein "góður pápi" eigur at gera fyri børn síni. 78% av monnunum svara, at pápar skulu læra tey at verða sjálvbjargin. 75% av teimum siga, at pápar eiga at verja tey og vera ein fyrimynd. Helvtin av monnunum – 48% - halda, at pápar skulu læra børnini at virða foreldrini og familjuna.






Talva 66 vísir, at næstan ongin munur er á ungum og eldri monnum í spurninginum um hvat, ein "góður pápi" eigur at gera fyri børn síni. Ávikavist 73% og 81% av monnunum undir 30 ár og yvir 40 ár meina, at pápar eiga at læra børnini at verða sjálvbjargin. Ávikavist 23% og 29% av monnunum undir 30 ár og yvir 40 ár meina, at pápar eiga at læra tey kristnatrúgv.






Talva 67 hyggur at sama spurningi sum undanfarnu talvurnar, men býtt í øki. Vit síggja her, at 16% av monnunum í Havn siga, at pápar eiga at læra børnini kristnatrúgv, meðan dupult so nógvir – 31% – uttan fyri høvuðsstaðarøkið meina, at ein høvuðsuppgáva hjá pápum er at læra børnini kristnatrúgv. Ávikavist 34% og 17% av monnunum í Havn og á bygd hava svarað, at ein “góður pápi” eigur at fáa børnini at liva sunt og at hugsa um sína heilsu.




Talva 68 hyggur at sama spurningi sum undanfarnu talvurnar, men sæð í mun til konservativu/liberalu virðini hjá monnum. Her eru rættiliga stórir munir at síggja. Til dømis siga 70% av konservativu monnunum, at pápar eiga at læra børnini kristnatrúgv, meðan einans 5% av liberalu monnunum siga tað sama. Ávikavist 87% og 63% av liberalu og konservativu monnunum meina, at ein “góður pápi” eigur at læra børnini at verða sjálvbjargin.




Talva 69 fortelur, hvat ið menninir meina skal til, fyri at læra at blíva ein "góður pápi". Heili 91% av monnunum meina, at tað hevur stóran (ella sera stóran) týdning at práta við konuna/makan um hesi viðurskiftini. Og 69% av monnunum meina, at tað hevur stóran (ella sera stóran) týdning at hugsa um tað, ið man hevur lært frá pápa sínum.




Talva 70 hyggur at spurninginum “Hvussu stóran týdning hevur tað, sum ein hevur lært frá pápa sínum fyri at gerast ein góður pápi?” í mun til aldur. 75% av monnunum undir 30 ár siga tað hava stóran (ella sera stóran) týdning. Og 60% av monnunum yvir 40 ár siga tað hava stóran (ella sera stóran) týdning.




Talva 71 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. 72% av monnunum á bygd siga tað hava stóran (ella sera stóran) týdning. 62% av monnunum í Havn siga tað sama.



Talva 72 vísir, at lutfalsliga fáir menn halda tað hava stóran týdning (ella sera stóran týdning) at tosa við prest fyri at gerast ein góður pápi. 60% av teimum 30-40 ára gomlu monnunum siga, at tað hevur lítlan (ella sera lítlan) týdning at tosa við prest (ella aðrar átrúnaðarligar leiðarar). Ávikavist 8% og 14% av monnum í 30-40 ára aldri og yvir 40 ár meina, at tað hevur stóran týdning (ella sera stóran týdning) at tosa við prest.




Talva 73 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. Nógv fleiri menn í Havn – 65% í mun til 46% - meina, at tað hevur lítlan (ella sera lítlan) týdning at tosa við prest fyri at gerast ein góður pápi.






Talva 74 hyggur at sama spurningi, men í mun til konservativ/liberal virði. Ein fjórðingur av konservativu monnunum halda tað hava stóran týdning (ella sera stóran týdning) at tosa við prest fyri at gerast ein góður pápi. Einans 5% av teimum liberalu monnunum siga tað sama.



Talva 75 vísir hvønn týdning menninir siga tað hava at tosa við ein sálarfrøðing ella familjuráðgeva fyri at gerast ein "góður pápi". Ungu menninir – undir 30 ár – halda tað hava størri týdning enn hinir menninir í kanningini. 27% av 18-29 ára gomlu monnunum siga tað hava stóran (ella sera stóran) týdning at tosa við ein sálarfrøðing ella familjuráðgeva. Einans 11% av monnunum yvir 40 ár siga tað sama. 59% av monnunum yvir 40 ár meina tað hava lítlan (ella sera lítlan) týdning at tosa við ein sálarfrøðing ella familjuráðgeva.




Talva 76 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. 19% av monnunum í Havn siga tað hava stóran (ella sera stóran) týdning at tosa við ein sálarfrøðing ella familjuráðgeva. 16% siga tað sama á bygd.






Talva 77 vísir hvønn týdning menninir siga tað hava, at tosa við konuna/makan hjá sær fyri at gerast ein góður pápi. Stór semja er millum menninar, yngri og eldri, um at hetta hevur stóran (ella sera stóran) týdning.




Talva 78 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. Her er sama úrslit – líkamikið hvar í landinum teir búgva, so meina menninir, at tað hevur stóran (ella sera stóran) týdning at práta við konuna/makan hjá sær fyri at gerast ein góður pápi.




Talva 79 vísir hvønn týdning ymisk viðurskifti í gerandislívinum hava fyri at fáa familju- og arbeiðslívið hjá pápanum at virka saman. 70% av monnum siga, at tað hevur stóran (ella sera stóran) týdning at royna at avmarka arbeiðsbyrðuna og ikki at arbeiða í frítíðini hjá sær. Og 74% siga at tað hevur stóran (ella sera stóran) týdning at planleggja og skipa gerandisdagin hjá foreldrunum og børnunum í familjuni betur. Hinvegin meina 57% tað hava lítlan (ella sera lítlan) týdning at biða konuna/makan um at arbeiða parttíð ella at als ikki arbeiða.






Talva 79B vísir hvønn týdning, ið menninir í kanningini siga, at avmarkað arbeiði hjá konuni/makanum (parttíð ella als onki arbeiði) hevur fyri at fáa familju- og arbeiðslívið hjá pápanum at virka saman. Ávikavist 12% og 19% av monnum undir 30 ár og yvir 39 ár siga tað hava stóran (ella sera stóran) týdning. 61% av monnunum, sum eru 40 ár ella yngri, siga tað tvørturímóti hava lítlan (ella sera lítlan) týdning. 50% av monnunum yvir 40 ár siga tað sama.




Talva 79C hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. Meðan 67% av monnunum í høvuðsstaðarøkinum siga tað hava lítlan (ella sera lítlan) týdning fyri at fáa familju- og arbeiðslívið hjá pápanum at hanga saman, so síggja vit, at helvtin – 51% - av monnunum á bygd eru av somu áskoðan. 15% av monnunum á bygd siga tað vera av týdningi (ella stórum týdningi) at makin einans arbeiðir parttíð, ella als ikki arbeiðir.



Talva 80 vísir, hvørjar eginleikar, menninir meina tað vera týðandi hjá børnum at læra frá foreldrunum. Tveir triðingar av monnunum í kanningini siga, at tað er av týdningi, at foreldur læra børnini hjá sær at vísa fólkaligan atburð. Góð helvtin av monnunum – 52% - sigur tað vera av týdningi at læra at verða sjálvstøðugur. 61% av monnunum siga tað vera týðandi at læra at sýna tolsemi og virðing fyri øðrum.




Talva 81 hyggur at sama spurningi, men sæð í mun til aldur. Eitt sindur av muni er á yngri og eldri monnum, tá spurt verður um eginleikar, sum eru týðandi hjá børnum at læra frá foreldrum heima. 17% av 18-29 ára gomlu monnunum siga "hart arbeiði" vera týðandi, meðan einans 7% av monnunum yvir 40 ár siga tað sama. Og meðan 34% av yngru monnunum siga "ábyrgdarkensla" vera týðandi eginleika at læra heima, so siga 50% av teimum yvir 40 ár tað sama.




Talva 82 hyggur at sama spurningi, men við støði í virðisgrundarlagnum hjá monnunum. 62% av teimum konservativu siga tað vera týðandi hjá børnum, at fáa uppaling í kristnu trúnni heima. Einans 2% av teimum liberalu siga tað sama. 20% av teimum liberalu siga “hugflog” (fantasi) vera ein týðandi eginleika at læra, meðan 10%

av teimum konservativu siga tað sama. 58% av teimum liberalu siga tað vera týðandi at læra at vera "sjálvstøðugur", meðan 42% av teimum konservativu siga tað sama.




Talva 83 vísir okkum, hvussu menninir lýsa munin á pápum í dag og pápum í 1950, viðvíkjandi spurninginum um hvussu nógva tíð teir brúka til húsligt arbeiði. 90% av

monnunum siga, at pápar brúka meira (ella nógv meira) tíð til húsligt arbeiði í dag. Einans 2% meina, at pápar brúka minni (ella nógv minni) tíð til húsligt arbeiði í dag.




Talva 84 vísir eisini, hvussu menninir lýsa munin á 1950 og 2022, men nú í mun til tíðina, ið pápar eru heima. 84% av monnunum siga, at pápar eru meira (ella nógv meira) heima í dag. Einans 2% meina, at pápar vóru meira (ella nógv meira) heima í 1950.






Talva 85 hyggur at muninum á 1950 og 2022 í mun til leiklutin, ið pápar hava í uppalingini av børnum. 87% av monnunum, meina at páparnir hava størri (ella nógv størri) leiklut í dag. Einans 2% meina, at pápar hava minni (ella nógv minni) leiklut í dag samanborið við støðuna í 1950.



Talva 86 hyggur at muninum á 1950 og 2022 í mun til spurningin um javnstøðu í familjulívinum. 76% av monnunum meina, at pápar hugsa meira (ella nógv meira) um javnstøðu millum kynini í dag. 9% av monnunum siga, at ongin munur er á 1950 og 2022 hesum viðvíkjandi.




Talva 87 hyggur at muninum á 1950 og 2022 í mun til maskulinitetin hjá monnum í Føroyum. 9% meina, at pápar eru meira (ella nógv meira) maskulinir í dag. Og meira enn helvtin – 55% – av øllum monnum í kanningini meina, at pápar eru minni (ella nógv minni) maskulinir í dag.






Talva 88 hyggur at muninum á 1950 og 2022 í mun til valdið, sum pápar hava í familjuni. 7% av monnunum meina, at pápar hava størri (ella nógv størri) vald í familjuni í dag, meðan 59% siga tað øvuta: at pápar hava minni (ella nógv minni) vald í familjuni í dag. 20% siga hinvegin, at ongin munur er.



Talva 89A hyggur at muninum á 1950 og 2022 í mun til tær avbjóðingar, sum pápar hava við at liva upp til krøvini, sum samfelagið setur. Úrslitið er áhugavert. 71% av monnunum siga, at krøvini, sum samfelagið setur í dag, eru meira (ella nógv meira) avbjóðandi hjá pápum. Einans 5% siga hinvegin, at krøvini er minni (ella nógv minni) í dag.









Talva 90 hyggur at muninum á 1950 og 2022 í mun til hvussu pápar tosa um kenslur og trupulleikar. 72% av monnunum meina, at pápar tosa meira (ella nógv meira) opið um kenslur og trupulleikar í dag. 13% siga, at ongin munur er á 1950 og 2022 hesum viðvíkjandi.



Talva 91A vísir, hvat ið menninir siga um munin á at vera pápi í 1950 og í 2022 sum heild. 86% av monnunum siga, at stórur ella sera stórur munur er á pápum í 1950 og í dag. 2% av monnunum meina hinvegin, at munurin er sera lítil.






Talva 92 vísir, hvat ið menninir siga um munin á pápum í Havn og á bygd í dag. 63% meina, at tað er munur á pápum í Havn og á bygd, meðan 20% eru ósamdir, og siga ongan mun vera á pápum í Havn og á bygd.




Talva 93 vísir, hvat ið menninir í kanningini meina um støðuna hjá pápum í føroyskum familjum í dag. 75% av monnunum eru samdir (ella sera samdir) í at bæði foreldrini hava somu ábyrgd, tá tað kemur til uppihalda familjuni fíggjarliga. 69% av monnunum eru ósamdir (ella sera ósamdir) í, at tað er meira umráðandi, at pápar tjena væl enn, at teir eru nógv saman við børnunum hjá sær. 58% av monnunum eru samdir (ella sera samdir) í, at menn hava kensluna av at ikki eydnast sum pápar, um teir ikki klára at uppihalda familjuni fíggjarliga.






Talva 94 vísir hvat, ið menninir meina um spurningin: eigur pápin at uppihalda familjuni fíggjarliga? 40% av monnunum yvir 40 ár eru samdir (púra samdir) í, at pápar eiga at uppihalda familjuni fíggjarliga. 37% av monnunum undir 30 ár siga tað sama.




Talva 95 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. Ávikavist 31% og 41% av monnunum í Havn og á bygd eru samdir (ella púra samdir) í at pápar eiga at uppihalda familjuni fíggjarliga. 37% av monnunum í Havn eru hvørki samdir ella ósamdir í hesum.




Talva 96 hyggur at sama spurningi, men í mun til konservativa/liberala virðisgrundarlagið hjá monnunum. 54% av teimum konservativu eru samdir (ella púra samdir) í at pápin eigur at uppihalda familjuni fíggjarliga. 32% av teimum liberalu eru

samdir (ella púra samdir) í hesum. Og 35% av teimum liberalu eru ósamdir (ella púra ósamdir) í, at pápin eigur at uppihalda familjuni fíggjarliga.




Talva 97 vísir hvat, ið menninir meina um spurningin: fáa menn kensluna av ikki at eydnast sum pápar, um teir ikki klára at uppihalda familjuni fíggjarliga? Her siga 63% av 18-29 ára gomlu monnunum seg vera samdar (ella púra samdar) í at páparnir fáa kensluna av at ikki eydnast. 57% av monnunum yvir 40 ár siga tað sama.






Talva 98 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. Sera lítil munur er á monnum í Havn og á bygd í mun til hendan spurningin. Ávikavist 21% og 17% av monnunum í høvuðsstaðarøkinum og á bygd eru ósamdir (ella púra ósamdir) í, at menn fáa kensluna av ikki at eydnast sum pápar, um teir ikki klára at uppihalda familjuni fíggjarliga.



Talva 99 vísir áskoðanina hjá monnunum í kanningina í mun til spurningin: hvussu samdur ert tú í, at bæði foreldrini hava somu ábyrgd, tá tað kemur til at uppihalda familjuni fíggjarliga. Her er breið semja um, at foreldrini hava somu ábyrgd. 80% av 30-40 ára gomlu monnunum siga seg vera samdar (ella púra samdar) í hesum.




Talva 100 hyggur at sama spurningi, men býtt í øki. Ávikavist 6% og 11% av monnunum í Havn og á bygd eru ósamdir (ella púra ósamdir) í, at bæði foreldrini hava somu ábyrgd.



Talva 101 hyggur at sama spurningi, men við støði í virðisgrundarlagnum (konservativ/liberal) hjá monnunum. 81% av teimum liberalu siga seg vera samdar (ella púra samdar) í, at bæði foreldrini hava somu ábyrgd, tá tað kemur til at uppihalda familjuni fíggjarliga. 70% av teimum konservativu siga tað sama.




Talva 102 vísir okkum hvat, ið menninir halda um foreldraleiklutin hjá pápum í Føroyum í dag. 85% av monnunum eru samdir (ella púra samdir) í, at pápar og mammur eiga saman at taka sær av børnunum. 59% av monnunum eru samdir (ella púra samdir) í, at pápar eiga at taka størri ábyrgd í barnauppalingini og í tí húsliga arbeiðinum í gerandisdegnum. Og 6% av monnunum eru samdir (ella sera samdir) í, at pápin eigur at hava síðsta orðið í sambandi við avgerðir heima.






